

Tórbjørn Jacobsen fær heilsuváttan frá Pál Weihe, petroleumslækna seint mánakvøldið - áðrenn hann fór umborð á West Hercules at vera loðsur. Mynd Jan Müller/oljan.fo

# Tobbi loðsur á West Hercules – kós móti Skálafirði

Deil:

**Jan Müller**

19.08.2014 - 10:04

Oljan.fo

Tað er havnameistarin í Runavík, Tórbjørn Jacobsen, ið sum loðsur í skrivandi løtu førir henda risastóra boripallin West Hercules, ið er størri en nein fótbóltsvøllur, trygt til lands.

Pallurin fór at sigla av leitimiðinum Súla Stelkur seint mánakvøldið. Tað eru umleið 100 fjórðingar inn á Skálafjørðin. Eftir tí oljan.fo skilur, verður pallurin millum oyggjarnar seinnapartin í dag. Ætlanin var upprunaliga, at hann skuldi koma á Skálafjørðin mikudagin, men hetta er nú broytt. Í løtuni stendur Tórbjørn Jacobsen á brúnni á West Hercules saman við skiparanum – við kós móti Skálafjørðinum.

Tað verða annars sett sera strong krøv til heilsu og trygd í oljuvinnuni og eru tey eyka strong fyri ein loðs. Tú skal hava eina heilt serstaka heilsuváttan, og tað er bara ein av norskum myndugleikum útpeikaður lækni, sum kann geva hesa. Føroyski pertroleumslæknin við ábyrgd av norskum pallum er Pál Weihe, yvirlækni, sum eisini hevur havt heilsuligu ábyrgdina fyri hesum pallinum, tá hann arbeiðir í føroyskum sjógvi.

Hóast pallurin er liðugur at bora á landgrunninum er uppgávan hjá Páli ikki liðug enn. Ein av hansara seinastu uppgávur var at kanna og fáa Tórbjørn Jacobsen eina heilsuváttan, so hesin kundi fara umborð á pallin tíðliga í morgun at vera loðsur.

